## Standa í stað

Føroyar standa í stað í botninum á styrkislistanum hjá altjóða fótbóltssambandinum FIFA. Tað vísir nýggjasti styrkislistin, sum júst er kunngjørdur. Føroyar eru aftur hesaferð nummar 198 av 207 fótbóltstjóðum í heiminum. Einasta europeiska fótbóltstjóðin, sum liggur aftanfyri Føroya á FIFA-styrkislistanum, er San Marino, sum er nummar 200. Trý europeisk lond liggja ovast á FIFA-styrkislistanum. Europameistararnir Spania eru ovast, Italia er nummar tvey, og Týskland er nummar trý. Fremsta norðurlandið er Svøríki, sum er nummar 28. Danmark er nummar 31. Eysturríki, sum Føroyar skulu spæla ímóti leygardagin, er nummar 82 á FIFA-styrkislistanum.

## UEFA óttast skuldina

Europeiska fótbóltssamgongan UEFA hóttir nú feløg, sum skylda ovurhondsstórar peningaupphæddir. Í gjár kom fram, at feløgini í ensku Premier League skylda tilsamans slakar 29 milliardir krónur, og tað órógvar leiðsluna í enska fótbóltssambandinum. Aðalskrivarin í UEFA, David Taylor, sigur í dag, at UEFA metir ein møguleika verða, at feløg, sum skylda stórar upphæddir, verða koyrd úr europeiskum fótbólti í framtíðini. Sambært enska fótbóltssambandinum standa tey fýra stórfeløgini Manchester United, Liverpool, Chelsea og Arsenal fyri einum triðingi av skuldini hjá feløgunum í Premier League.

# Skal føra Eysturríki aftur á slóðina

**Ikki er talan um nakran ársunga, sum eysturríkska fótbóltssambandið hevur sett sum landsliðsvenjara. Karel Brückner hevur verið virkin, sum fótbóltsvenjari í yvir 35 ár**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Karel Brückner er ein av mest virdu landsliðsvenjarunum yvirhøvur, eftir at hann í átta ár stóð á odda fyri kekkiska landsliðnum, sum støðugt helt seg í europiska oddinum*
*Mynd: Polfoto/AP*

Í heimlandinum Kekkia hevur núverandi eysturríkski landsliðsvenjarin, Karel Brückner eyðknevnið "Kleki Petra". Kleki Petra er høvuðspersónurin í einari skaldsøgu um ein indianaraættarbólk í Norður-Amerika. Við síni krókutu nøs, og sínum langa, síða gráa hárið er Karel Brückner rættuliga átøkur Kleki Petra. Men hóast heldur villa hárið, so er talan um ein hin gløggasta venjaran í Evropa.

### Var áleypari

Karel Brückner er føddur 13. november 1939 í Olmouc í tí, sum tá nevndist Kekkoslovakia. Sum seks ára gamal byrjaði hann at spæla fótbólt í felagnum, Spartak MZ Olomouc. Brückner spældi barna- og ungdómsfótbólt við Spartak MZ Olomouc til hann var 18 ára gamal. Vaksnamanna-yrkisleiðina byrjaði Brückner við felagnum, TJ MZ Olomouc, árini 1958-1965. Kappingarárið 1965-1966 spældi hann við Banik Ostrava. Árini 1966-1973 spældi hann við Sigma Olomouc, sum kom at gerast yndisfelag hansara. Nógv av hesum kappingarárunum spældi Brückner í næstbestu og í triðjubestu kekkoslovakisku fótbóltsdeildini. Men sannleikin um stórar venjarar hevur mangan verið, at teir ikki altíð vóru millum teir allarmætastu fótbóltsspælarnar.

### Byrjaði í 1973

Brückner byrjaði sum venjari hjá Sigma Olomouc í 1973. Felagið hevði tá sæti í 3. deild. Seint, men spakuliga gekk rætta vegin fyri Sigma. Í 1977 høvdu teir vunnið sær sæti í næstbestu, kekkoslovakisku fótbóltsdeildini. Aftaná seks ár, sum venjari hjá Sigma, varð tíðin búgvin at royna aðrar leiðir hjá Brückner. Í tvey ár vandi Brückner eitt 2. deildarlið, sum nevnist Zelezarny Prostejov. Àrini 1981-1983 slapp Brückner loksins at royna seg sum venjari í bestu kekkoslovakisku fótbóltsdeildini. Við liðnum Zbrojovka Brno eydnaðist tað Brückner at gerast nr. 11 í bestu fótbóltsdeildini, kappingarárið 1981-1982. Í 1983 byrjaði Brückner sítt næsta tíðarskeið í Sigma Olomouc. Nú var felagið í bestu fótbóltsdeildini, og tað gekk heilt væl hjá hópinum. Fyrsta árið gjørdist teir nr. 6, og árið eftir nr. 4, so felagið kvalifiseraði seg til UEFA-Cup kappingina. Men kappingarárið 1986-1987 gekk av skriðuni. Sigma gjørdist nr. 14 í liguni, og Brückner segði starvið frá sær.

### U-21 landsliðið í eitt ár

Ì 1987 og 1988 slapp Brückner at royna seg, sum landsliðsvenjari. Kekkoslovakiska fótbóltssambandið setti hann sum U-21 landsliðsvenjara, men talan gjørdist bar um eitt ár. Í 1988 vendi Brückner aftur til felagsfótbólt. Í 1988-1989 vandi hann 2. deildarliðið, ZVL Zilina. Men Sigma Olomouc dróg aftur, og hesaferð gekk betri enn nakrantíð í Sigma. Brückner førdi Sigma til eitt 3. pláss í liguni, og enn einaferð sluppu teir at royna seg í UEFA Cup kappingini. Ì UEFA Cup kappingini 1991-1992 vann Sigma seg heilt í fjórðingsfinaluna, sum gjørdist endastøðin. Fjórðingsfinalan var ímóti spanska fótbóltsrisanum, Real Madrid. Næsta kappingarár gjørdist Sigma aftur nr. 3, og endurvann sætið í UEFA Cup kappingini. Í 1994-1995 hevði Brückner eitt stutt tíðarskeið, sum venjari hjá FC Petra Drnovice. Kappingarárið 1995-1996 royndi Brückner seg í slovakisku liguni, har hann vandi slovakiska høvuðsstaðarfelagið, Inter Bratislava. Í 1997-1998 vandi hann á fjórða sinni sítt elskaða felag, Sigma Olomouc.

### Landsliðini koma á breddan

Í 1997 byrjaði eisini tann veruliga yrkisleiðin, sum kekkiskur landsliðsvenjari. Karel Brückner hevur havt tríggjar leiklutir, sum kekkiskur landsliðsvenjari. Árini 1997-2001 hevði hann ábyrgdina av kekkiska U-21 landsliðnum. Árini 1998-2001 var hann hjálparvenjari hjá kekkiska A-landsliðnum, og árini 2001-2008 var hann høvuðsvenjari hjá kekkiska A-landsliðnum. Kekkia spældi seg til EM-endaspælið í 2000, sum var hildið í Belgia og Hollandi. Kekkia var í bólki saman við Fraklandi, Hollandi og Danmark. Fraklendingar og hollendingar gjørdist ov sterkir, og Kekkia endaði á 3. plássi í innleiðandi bólkaspælinum, og máttu teir siga farvæl til EM saman við Danmark. Á heystið í 2001, tá tað stóð greitt, at Kekkia ikki rakk HM-endaspælinum í Suður-Korea og Japan fekk Brückner høvuðsábyrgdina av kekkiska A-landsliðnum. Kekkia spældi seg til EM-endaspælið í Portugal í 2004. Liðið var millum favorittarnar at vinna EM. Fólk minnast við serligari gleði dystin ímóti Hollandi, sum Kekkia vann 3-2, hóast Holland var frammanfyri 2-0. Táverandi hollendski landsliðsvenjarin, Dick Advocaat viðgekk, at hann var taktiskt útspældur av gamla kekkiska revinum, Karel Brückner. Men í hálvfinaluni rendi Kekkia seg í verjubetonmúrin hjá grikkum, sum sigraðu 1-0. Brückner førdi Kekkia til HM-endaspælið í Týsklandi í 2006. Tað byrjaði væl við einum 3-0 sigri á USA, men so taptu kekkar 0-2 ímóti bæði Ghana og Italia, og kekkar máttu heim. Í EM-endaumfarinum í Sveis og Eysturríki í summar lá tað aftur í kortunum, at Kekkia aftur fór at fáa eina góða endastøðu í einum EM-endapæli. Men í avgerandi dystinum ímóti Turkalandi í innleiðandi bólkaspælinum gjørdi kekkiski málverjin, Petr Cech eitt dropp, sum sjáldan er sæð í fótbólti fyrr, og endin var, at Kekkia tapti 3-2. Karel Brückner kundi tó lyfta høvdið høgt. Hann hevði ført Kekkia heilt fram á 2. plássið á FIFA-styrkislistanum. Kekkia var nr. 8 á styrkislistanum, tá Brückner slepti endanum. Nú venur Karel Brückner Eysturríki, sum er nr. 82 á FIFA styrkislistanum. Tað hevur gingið væl og illa hjá Brückner, sum eysturríkskur landsliðsvenjari. Eysturríki vann ein flottan 3-1 sigur á Fraklandi á Ernst Happel Leikvøllinum í Wien, men 4 dagar seinni taptu teir 0-2 ímóti Litava í Vilnius. Karel Brückner og Eysturríki møta nú Føroyum, sum eru nr. 198 á FIFA-styrkislistanum. So er at vóna, at tey 116 plássini, sum eru millum okkara landslið ikki fara at síggjast ov nógv á vøllinum.

# Nýtt fordømi frá Aganevndini

**Spælarar, sum ikki standa á spælaralistanum hjá FSF, hava ikki loyvi at spæla. Líka mikið um hesir bert hava umboðað eitt og sama felag gjøgnum árini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Páll Mohr Joensen í fyrraárið gjørdist kendasti fótbóltsspælarin í Føroyum, stóðst nógv kjak um, hvussu hart og kontan spælaralistin hjá FSF skuldi takast.

Fleiri dømi um spælarar, sum ikki stóðu á listanum, vórðu grópað fram, og tí kjakast varð dúgliga, um hesir vóru lógligir ella ikki.

Hóast reglurnar um loyvisbrøv sum so eru púrasta greiðar, so skapti tað málið eisini fordømi um, at spælarar, sum bert hava umboðað eitt og sama felag gjøgnum árini eru at rokna sum lógligir spælarar hjá hesum felag. Ein loysn, sum samstundis forðaði fyri einum sonnum regni av kærumálum. Tí tað finnast hópin av spælarum, sum av eini hvørjari orsøk ikki eru komnir á spælaralistan. Ikki minst tí hetta sjáldan er aktuelt, fyrr enn spælari umhugsar at flyta felag.

Men nú er Agakærunevndin so komin til aðra støðu.

AB kæri nevnliga Skála fyri nýtslu av ólógligum spælara, tá liðini dystaðust í 2. deild. Upprunaliga endaði dysturin 2-2, og tað úrslitið bar við sær, at AB ikki rakk fram um MB í dystinum um uppflyting.

Aganevndin hevur tó gjørt av, at AB skal vinna dystin. Í niðurstøðuni verður sagt, at brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's, og at fordømi er um, at brúk av ólógligum spælarum er sektað við, at felagið verður dæmt at tapa dystin.

Aganevndin sigur seg meta, at tey ikki ikki kunnu síggja burtur frá slíkum fordømum, men tað verður so ikki staðfest, um tey eisini hava tikið atlit til fordømini, sum vórðu skapt í 2006 um spælarar, sum bara hava umboðað eitt og sama felag.

Skála hevur tó kært dómin til yvirkærnevndina.